


*Nr. 15* *22. juli 2018* *78. árg.*

# Aldri einsamallur

Øll eru vit á ein hátt einsamøll. Men til ber samstundis at vera bæði einsamallur og bundin at øðrum. Tað eru vit í dópinum, sum á ein heilt serligan hátt bindur okkum at Jesusi og likami hansara.

Mong okkara uppliva einsemi. Tað kann brádliga gera vart við seg, tá ið vit minst vænta tað. Og so sita vit har einsamøll, og okkum leingist eftir felagsskap. Hetta er ein kensla djúpt inni í sálini, av at vit eru púra einsamøll í heiminum, ja í øllum universinum.

Grundleggjandi og djúpast sæð eru vit einsamøll. Vit verða aldri fullkomiliga eitt við eitt annað menniskja. Men samstundis eru vit á ein ella annan hátt knýtt at onkrum øðrum og størri. Tað hendir í dópinum. Her koma vit í samfelag við Jesus, Guds son.

Paulus skrivar í 6. kapitli í Rómverjabrævinum, at vit í dópinum eru grivin við Jesusi til deyða og fara at rísa upp saman við honum. Paulus heldur, at vit hava lut í Jesu deyða og uppreisn. Vit eru til í kraft av honum. Lív okkara gevur djúpast sæð bara meining, um vit eru bundin saman við Jesusi. Vit liva í honum og hann í okkum. Jesus livir, tí kunnu vit liva her og nú og ævigt. Aldri einsamøll. Men saman við honum. Hetta er ein hugsan, eitt sjónarmið og ein veruleiki, sum vit kunnu nýta restina av lívi okkara at royna at skilja og liva í.

Í dópinum vórðu vit eisini bundin at Jesusi á ein annan hátt. Kirkjan verður rópt likam Krists, og tá ið vit verða doypt, verða vit innlimað í hana og gerast ein partur av henni.

Soleiðis sæð eru vit ikki longur einsamøll. Vit hava eina familju, sum vit eru bundin saman við í trúnni á tann sama Harra og Frelsara, og vit kunnu luta lív, hugsanir og kenslur við hvørannan; eisini kensluna av einsemi.

# Trúfesti

*Harrin roynist trúfastur. (Jesaja 49,7).*

Tá ið Harrin doyði, tóktist øll vón fyri gerningi hansara at vera burtur.. Ein lítil flokkur av lærusveinum var leivdin av teimum skarum, sum savnaðust uttan um hann. Og lærusveinarnir fóru aftur til útróðrar. Men enntá krossurin, sum teir hildu vera djúpastu vanvirðing, gjørdist vegurin til hin størsta heiðurin.

Soleiðis gongst tær kanska eisini. Tú hevur eitt skifti knógvað undir vónbrotum og pínu. Men minst til, at Harrin roynist trúfastur. Ein kona sær ongantíð, at maður hennara umvendir seg; men Harrin roynist trúfastur.

Ein trúboði ella prestur sær kanska ongantíð ávøkstur av tí sáði, hann sáaði; men hann upplivir, at Harrin roynist trúfastur. Hvørki bøn ella boðan skulu vera burturspilt, men einaferð bera ávøkst. Einaferð skulu vit av dýrdarinnar fjallatindi síggja ávøkstin av arbeiði okkara, og Harrin gjøgnum okkum gjørdi meira, enn tordu at vóna – ***tí Harrin roynist trúfastur!***

*t.* týddi.

# Verji okkara

*Og tó at onkur syndar, tá hava vit ein talsmann hjá faðirinum, Jesus Kristus hin rættvísa. Jóh. 2,1.*

Talsmaður merkir her sakførari. Ein sakførari røkir sakina hjá onkrum øðrum. Men Jesus, sakførari okkara, snarar hesum eitt sindur. Hann førir sína egnu sak. Og hann ger tað fyri at gagna okkum.

Ímynda tær ein rættarsal, har djevulin lesur upp eina lemjandi skuldseting og sigur háðandi: „Hatta ómennið hevur uppiborið at doyggja. Hann sigur seg vera kristnan, men lív hansara er ein gøla. Hann sigur seg at kenna Jesus, men tað sæst ikki á, hvussu hann tíggjar sær.“

Ímynda tær so, at Jesus stígur fram sum talsmaður tín, verji tín. Hann talar við sjálvsáliti og myndugleika og sigur. „Hesin persónur hoyrir mær til. Eg doyði fyri hvørja einastu synd, sum hann gjørdi.“ Tað hevði í sær sjálvum verið nóg mikið; men so leggur hann nøkur orð afturat, sum gera okkum heilt bilsin: „Hvat ið meira er, er at eg havi ikki bara strikað skuld hansara; men eg vil, at tú, Faðir, góðskrivar honum alla mína rættvísi.“

Jesus, talsmaður okkara, strikaði alla syndaskuld okkara á krossinum. Men hann fór enn longri. Hann gav okkum eisini sín egna rættleika, sína góðvild. Tá ið Faðirin hyggur at tær, sær hann alt tað góða, sum Sonur hansara hevur gjørt.

# Gud er ikki deyður

Mortan Luther var vanliga í góðum lag. Tó kundi henda, at hann kendi seg tungan í huga, eins og Gud var deyður, og hann ikki longur hevði ein livandi Gud at seta lít sína á. Vanliga kom kona hansara honum til hjálpar í slíkum løtum, men hesa einu ferðina var hann so niðurundirkomin, at í fyrstu syftu megnaði heldur ikki hon at fáa lagið at batna.

Luther gjørdi av at fara út á bygd nakrar dagar at vita, um hetta ikki mundi fara at hjálpa. Jú, lagið batnaði. Men tá ið hann kom heimaftur, fann hann konuna sitandi í stovuni, ílatin svartan syrgibúna við høvuðklæði og við einum hvítum turriklæði í hondini. Hon græt.

„Hvat er hent?“ spurdi Luther óttafullur. „Nakað ræðuligt, „svaraði konan. „Hugsa tær, Gud er deyður, tað er tí, eg syrgi.“ Staðin fyri at falla í fátt, sum hann var vanur, brast Luther útúr at flenna. „Nei, konan, onki er Gud deyður, men hann livir!“ Luther fekk góða lag sítt aftur og fekk av nýggjum at kenna, at Gud á ongan hátt er deyður, men av sonnum livandi og mentur eins og áður at fylla hjarta hansara við gleði. Konan hevði við Guds hjálp enn einaferð hjálpt honum.

Undurfult at vita, at Gud livir til allar tíðir, og at hann, hvussu niðurundirkomin vit enn eru, til eina og hvørja tíð er mentur at fylla hjørtu okkara við gleði og einum undurfullum friði, sum bara Gud er mentur at geva okkum.

*A. J.*

# Trúgva tygum á hin versta?

Tað er løgið, eitt blað ringir til mín og spyr um hetta. Spurt varð: ***„Trúgva tygum á hin versta?“***

Eg svaraði púra avgjørdur: nei, tí hin versti er ein lygnari, og á hann trýr ongin. Tað er ævinligur vesaldómur at trúgva á hann. Eg trúgvi á Gud. Eg trúgvi á Jesus, tí hann er sannleikin.

Men verður spurningurin vendur: „Trýrt tú, at hin versti er til?“ So játti eg beinanveg. Men hví?

Eg kann ikki siga tað gjøllari. So kunnu fólk flenna, sum tey vilja. Jesus trúði, at hin versti var til. Burtur úr hesi heilagu søguni kemur hetta: ein flokkur, sum er Guds, ein heimur, sum er Guds, umveldi hansara, ein flokkur, sum er umveldi hins ónda, sum heimur Guds skapar sær eftir á ein óhugnaligan hátt.

Og ímillum hesi bæð ríki liggur heimur okkara. Har stendur stríðið, og stríðst verður um okkum.

*Chr. Bartholdy/ t.* týddi.

# Einastandandi skapt

„Á Teg havi eg styðjað meg líka úr móðurfangi. Tú ert Tann, ið dró meg út úr móðurlívi; um Teg er lovsongur mín altíð.“ Sálm. 71,6 V. D.

Fingramerki tíni, fótafar, rødd tín eru genetisk heilt einastandandi. Eingin er sum tú. Tað hevur ongantíð verið nakar sum tú, og har fer heldur ongantíð at koma nakar. Hevur tú nakrantíð sett prís upp á tað? Hevur tú nakrantíð sæð, hvussu stórt tað er? Um tú ikki hevur gjørt tað fyrr, ger tað so í dag!

„*The Kings Daughter*“ Lilla Gere.
*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74




***Nr. 16*** ***5. august 2018*** ***78. árg.***

# Hvør hevur valdið?

Menniskju vilja fegin fáa greiði á, hvør er sterkastur, ella hvør hevur størst vald. Súkklarar dystast um, hvør kemur fyrstur á mál. Í H M í fótbólti verður kappast um, hvør í heiminum er stinnastur í fótbólti. Sama er skilið í øðrum ítróttagreinum.

Menniskjan hevur altíð roynt at fáa vald á øðrum. Roynt hevur verið at gjørt av, hvør ið sterkastur er við at fara í kríggj móti hvørøðrum ella við at kúga hvørannan. Slíkt hevur borið nógvar vanlukkur við sær. Men eisini á friðarligari hátt hevur verið roynt at fáa vald á øðrum. Handlarnir kappast um valdið. Tað sama gera børn. Tað er t.d. ein í flokkinum, ið líkasum stýrir nøkrum av hinum.

Men tað er ongin, sum hevur vald á øllum lutum, og ongin varðveitir valdið í allar ævir, tí ongin livir ævigt.

**Jú, tað er ein, sum livir ævigt.** Hann er tí eisini tann einasti, sum kann siga: „Mær er fingið alt valdið, í himli og á jørð.“ (Matt. 28,18). Tað er Jesus. Vald hansara er galdandi um allan heim og til allar tíðir.

Men hann nýtir vald sítt til okkurt heilt annað enn at gerast bestur innan súkkling ella í fótbólti. Heldur ikki nýtir hann sítt ovurstóra vald til at tjena flest pengar ella at stýra øðrum.

Jesus nýtir vald sítt til at frelsa menniskju. Vald hansara er kærleikans vald. Hann nýtir tað til at hava umsorgan fyri tær og mær og øllum menniskjum.

Men vald Jesu er ikki altíð lætt at bera eyga við. Hann doyði á einum krossi og reis upp úr grøvini, uttan at serliga nógv sóu tað. Hann fór til himmals, og í dag er hann ósjónligur. Men alt

vald hevur hann. Tað sást, tá ið hann var her á fold og vann sigur á deyða, Djevli og syndini. Tað sæst eisini í dag, at hann við kærleika sínum dregur menniskju inn í sítt ríki. Og tað fer at vísa seg, tá ið hann ein dag kemur aftur at døma livandi og deyð.

# Forbøn

Vit hava umsorgan fyri øðrum við t.d. regluligari forbøn. Forbønin er ein gáva og ein umsorgan, sum vit geva øðrum. Vit hava ofta langar listar við bønarevnum: Sjúk, líðandi, okkara familja, grannar okkara trúboðarar í útlondum og trúboðarar á staðnum og tann globala kirkjan, forbøn fyri teimum, ið verða forfylgd o. s. fr.

Viðhvørt verður forbønin ein tung byrða, tað eru so mong at biðja fyri, menniskjum, sum fingu eina harða lagnu, viðurskifti, sum tykjast óloysilig o. s. fr.

Niðanfyri skal eg geva tær nakrar setningar, sum hava hjálpt mær væl, so at eg nú síggi, at forbøn er ikki ein tung byrða, sum eru tað vit, sum skulu bera heimin á okkara herðum. Tað er ein, sum hevur borið alt og framvegis vil bera.

Set teg niður í friði og náðum og grunda gjølla í kvirru um hesar setningarnar:

> Forbøn er ikki at trábiðja og plága Gud til at gera okkurt, men at standa í nærveru Guds vegna ein annan.
> Forbøn er ikki nakað, har tú spennir teg til at savna tankar tínar, men eitt hvílandi uppmerksemi.
> Vita skalt tú, at Gud hevur arbeitt leingi, áðrenn tú trein inn á pallin, og hann arbeiðir nú.
> Vit skulu fylla vatnskerini við vatni – ***at gera vín er hansara gerningur.***
> Vit skulu flyta steinar, ***tað er hann, sum sigur: „Lázarus, kom út.“***

*E. Campbell* umsetti.

---

At fiska er mítt lívskall. Meistarin bað okkum um at gerast mannafiskarar.

*e.c.* ums.

# Tíðin – eitt dagligt undur

Ein vísur maður segði, at „tíðin er eitt dagligt undur.“ Ein annar hevur sagt: „Elskar tú lívið, oyðsla so ikki við tíðini, tí hon er tað tilfarið, sum vit eru evnaði úr.“ Mong orðatøk umrøða tíðina sum okkurt virðismikið og sum okkurt, ið vit illa kunnu fáa aftur.

Slíkar hugsanir mugu ikki sleppa at leiða strongd á okkum, men takksemi. Gud hevur givið okkum tímarnar og dagarnar. Og tað, sum Gud skapar, skapar hann í ríkiligt mát. Men til eru óndar maktir, sum royna at ræna dagarnar frá okkum. Tær góðu løturnar og teir sjáldsomu møguleikarnar mugu vit taka at okkum, tá ið høvi býðst, tí teir eru lagdir á veg okkara, fyri at vit skulu taka teir sum eina gávu av Guds góðu hond. Í Bíbliuni lesa vit: „*Gevi tí gætur eftir, hvussu tit liva, ikki sum óvísir, men sum vísir, so at tit keypa hina lagaligu stundina, tí at dagarnir eru vondir.*“

*(Ef. 5,15-16).*

## Napoleon visti ikki, at tað vóru páskir

Tá ið páskaklokkurnar ljóma úr kirkjum og katedralum um allan heim, bera tær ikki boð um, at Kristus er deyður, men at ***Hann er risin upp.***

Á herferð síni inn í Eysturríki nærkast Napoleon keisari nú bygdini Feldkirch uttan stórvegis mótstøðu. Meðan fíggindin tað kvøldið helt leið sína fram móti bygdini, kom bygdarfólkið saman til bøn í eini lítlari kirkju. Hetta var páskaaftan.

Í sólarrenningini morgunin eftir ljómaðu páskaklokkurnar út um bæði bygd og bø. Napoleon og hermenn hansara hugsaðu ikki um, at hetta var páskamorgun og hildu, at eysturríkski herurin um náttina var komin inn í bygdina. Napoleon gav boð um at taka seg aftur, og tí gjørdist ongin bardagi um bygdina Feldkirch. Páskaklokkurnar fingu fíggindan at taka seg aftur, og eysturríkska bygdin slapp at liva í friði.

Um páskirnar kanst tú vera kringsettur av fíggindum, sum herja á tín sálar-skansa. Um tú veruliga skilur, hví páskaklokkurnar kima, noyðist fíggindin at taka seg aftur.

# Hvat sløkkir tostan

Tað var Moody, sum í einum av bókum sínum segði, at blakar tú ein neva av saguspønum út í tún, so er tað ikki ein fuglur, sum so mikið sum skeitir at teimum; men blakar tú ein neva av molum, so eru smáfuglarnir har beinanvegin og eta teir upp.

Ta ið vit hugsa um andaliga føði, so kennir eitt satt Guds barn munin á heimsins saguspønum og breyðinum, sum kom niður av himli, Jesus Kristus. Hansara orð er hitt einasta, sum kann sløkkja ta tystu sálina. Drekk ikki úr heimsins runuhyljum, men fyll teg við tí klára, reina kelduvatninum, sum Jesus hevur at geva tær - orð sítt.

Alt summarið á tamb eru verðslig tiltøk um vikuskiftini, ja, bæði tvey og trý ymisk eru at velja ímillum. Men tá ið larmurin og gangurin eru tagnað, sloknar gleðin eisini, tí gleði er ikki at finna í larmi. Føroyska orðið stuttleiki sigur alt: tað er ein stuttur leikur.

Nei, Jesus hevur ta ektaðu vøruna at bjóða, hann fyllir lívið við meining og innihaldi. Um vit taka ímóti honum í trúgv og bjóða honum inn í hjarta okkara, so gevur hann okkum syndafyrigeving, eitt ævigt lív, frið og ta sonnu gleðina.

Hann er Vegurin, Sannleikin og Lívið. Ongin kann ogna sær alt hetta uttan at geva seg yvir til Jesus. Hann bíðar eftir tær og vil tær alt tað besta.

*Effie Campbell.*

---

Skrivað stendur í Orðt. 11,11, at **bønirnar hjá gudsóttandi fólkum fáa býin at blóma.** So latið okkum vera trúføst í bønini fyri landi okkara og øllum býum og bygdum, so at Gud verjir okkum. Latið okkum biðja: „Leið okkum ikki í freistingar - men frels okkum frá tí illa!“

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
**Umbróting & prent:** Prenta – 35 77 74